

# Spenningurin er størri enn nakrantíð

**Støðan eftir nítjanda umfarið ber við sær, at tað nú er ilt at finna nakra uppgerð, sum ikki hevur alstóran týdning fyri stríðið um heiðursmerkir og niðurflyting**

19. UMFAR SAMANUM

*Jóannes Hansen*

Søga varð skrivað í føroyskum fótbólti í vikuskiftinum. Hetta var fyrsta ferðin, at tað varð telvast í nítjanda umfarinum. Higartil hevur kappingin ongantíð verið longri enn tey átjan umførini, sum hon hevur verið síðani í 1988, tá ið besta deildin varð víðkað til tíggju lið.

Spenningurin er so intensur, sum tað ber til at ímynda sær at hann kann verða. NSÍ hevur verið eitt sindur aftanfyri trý tey fremstu í kappingini um FM og altjóða atgongumerkini. Fyri teir í Runavík lagaði hetta vikuskiftið seg so væl, sum teir í NSÍ bara kundu droyma um. Teir settu rættuliga falmaða meistaraliðið orduliga upp á pláss, og so var tað meiri enn eykavinningur, tá ið NSÍ venjarin og nógvir av spælarunum sunnukvøldið vóru eygnavitni á Skála, tá ið tey bæði oddaliðini í Formuladeildini - Skála og B36 - fyri triðju ferð av trimum møguligum býttu stigini millum sín.

Í NSÍ kenna teir seg so at siga at spæla finalu hvørja ferð teir eru á vøllinum. Næsta takið verður sunnudagin móti júst B36. NSÍ sjónarvitnini á Skála sóu, at B36 er ógvuliga ilt at fáa bilbukt við. Árstalsfelagið kom illa frá fyrra umfarinum, men teir fóru ikki um koll, og tá ið teir høvdu umskipað, mentu teir seg og kundu gott havt vunnið. Um tað skal undrast yvir nakað, so skal tað vera, at tað skuldi bera til hjá so væl skipaðum og mannaðum liði sum B36 at leggja fyri so skeivt upp á bein, sum teir gjørdu á Skála. Tað fara teir neyvan at gera, tá ið teir sunnudagin skulu spæla hinumegin Skálafjørðin.

Skálamenn kvíga fyri, at teir ikki eru nóg væl fyri við fólki, nú skaðar eru farnir at gera um seg. Tað fer at vísa seg. Um tað fer at vilja væl við, so verður hetta neyvan nakar trupulleiki, men tað er eisini møguleiki fyri, at tað fer at vilja illa við. Sunnukvøldið vísti, at Skála neyvan tolir, at lyklaspælararnir ikki verða førir fyri at spæla.

Sunnudagin skal Skála til Vágs. Tað verður rættuliga áhugaverd uppgerð. Hjá VB hevur ikki gingið nakað serligt síðstu ferðirnar. Í Gøtu bjargaðu teir sær í evstu løtu eitt stig. Tað kann fara at vísa seg at hava alstóran týdning. Bæði í samantalda roknskapinum og ikki minst fyri moralin.

ÍF megnaði 1-1 á Eiði, og tað eru fuglfirðingar sera væl nøgdir við. Um tað eydnast teimum sunnudagin at fáa fult, tá ið GÍ fer at koma inn um Varmakeldueið, fer tað at síggja rættuliga væl út hjá ÍF. Hjá tí partinum, sum einki fer at fáa burturúr grannauppgerðini, fer tað at síggja meiri trongligt út.

EB/Streymur hevði góðan møguleika at toga seg nærri heiðursmerkjunum, men tað miseydnaðist. Tá ið teir vóna at vera við í kappingini um málmin, so hava teir ikki ráð til sovorðið úrslit á heimavølli móti fuglfirðingum.

EB/Streymur, sum er á fimta plássinum, er í løtuni ikki boð upp á heiðursmerkini. Tað eru tey fýra, sum eru omanfyri samansetta liðið.

Øll hini fimm - frá ÍF á 6. plássinum og til TB á 10. plássinum - eru meiri ella minni í vanda fyri at flyta niður. Klaksvíkingar lyftu sær við sigrinum á Sevmýri eitt vet frá beinleiðis niðurflytingini, men teir kenna seg neyvan tryggar. Heldur mugu teir fegnast um góða hugburðin, sum kom til sjóndar í 2. hálvleiki, tá ið tað eydnaðist teimum at venda hóttandi 1-0 tapi til 2-1 sigur.

Tvørámenn vístu avgjørt ikki taparahugburð og máttloysi, sum ofta eyðkennir tann, sum er á veg móti lægri deild. Sunnudagin skal TB spæla í Gundadali móti HB. Tað kann gerast rættuliga áhugaverd uppgerð. Hóast leikliga trilvandi, so er HB framvegis við í meistarastríðnum, og tað er møguleiki fyri, at teir eftir 20. umfarið fara at vera oddalið. Men TB hevur fyrr gjørt um seg móti HB, og avrikið leygardagin kundi givið tvørámonnum blóð á tonna.

Skráin hjá TB næstu vikurnar sær rættuliga ræðandi út. Eftir HB dystin í Gundadali fara teir at fáa vitjan av NSÍ og B36, og so skulu teir norður til Eiðis!

TB kappast framvegis við KÍ um at sleppa av plássinum, sum ber beinleiðis niðurflyting við sær. Klaksvíkingar skulu í síðstu umførunum spæla móti B36, HB og NSÍ. Tí verður tað neyðugt hjá teimum at skava stig saman, tá ið tey, sum á støðutalvuni eru nærri KÍ enn toppliðini eru tað, eru mótstøðulið. Næstu ferð skal KÍ spæla á heimavølli móti EB/Streymi, sum so ofta hevur argað klaksvíkingar, og so stendur GÍ í Gøtu fyri tørni. Hetta eru sera týdningarmiklar uppgerðir fyri vánirnar hjá KÍ at halda fram í bestu deildini, sum teir altíð hava verið partur av.

Næstu dagarnar fer stóra altjóða avbjóðingin móti Kypros, sum í vikuskiftinum var so syndarliga meint rakt av flogvanlukku, at mynda ítróttarligu dagsskránna. Sunnudagin verður aftur farið undir langa endaspurtin í Formuladeildini. Tá sær skráin soleiðis út: VB-SKÁLA, ÍF-GÍ, KÍ-EB/STREYMUR, HB-TB og NSÍ-B36.